DAGSINS MEINING

Smeitur fyri nýggju sjálvstýrisætlanina!

Føroyingar taka ikki undir við tí nýggju sjálvstýrisætlanini hjá landsstýrinum, og samgonguflokkarnir missa meirilutan á løgtingi. Tað vísir feskasta veljarakanningin, sum tað nýggja vikublaðið, Fregnir, kunngjørdi ígjár.

Kortini er ein meiriluti fyri fullveldi, og ein lítil meiriluti er fyri at skerja heildarveitingina úr Danmark 400 milliónir krónur frá næsta ári! Hetta fær Fregnir at staðfesta, at sjálvstýrissíðan er sterkari enn sambandssíðan.

Tað er bara partvíst rætt, tí meiri enn 51 prosent vilja kortini verða verandi í danska ríkinum, samstundis sum sløk 42 prosent vilja úr ríkinum. Hetta er ein andsøgn, men sum kortini er í samljóð við ætlanina hjá landsstýrinum.

Nýggja ætlanin hjá landsstýrinum – um vit hava eitt landsstýri, tá hetta blað kemur út – byggir á, at Føroyar verða verandi í danska ríkinum í hvussu er tey næstu 12 árini, tá støða skal takast til, um Føroyar skulu skipast sum fullveldi.

Samanumtikið vísir kanningin, at vit hava tveir líka stórar blokkar – ein samríkisblokk og ein sjálvstýrisblokk. Tveir blokkar, har munurin millum flokkarnar innanhýsis kortini er so stórur, at felagsvirðið á blokkunum er ivingarsamt!

Tí bendir henda kanningin, og politiska gongdin tað seinasta hálva árið, á, at tað framvegis er møguleiki fyri, at ein komandi loysn í ríkisrættarligu støðuni kann koma at ganga tvørtur um verandi mark millum samgongu og andstøðu!

Víst eru 51 prosent fyri fullveldi, men sama prosenttal vil verða í ríkinum. Hetta bendir aftur á, at ein meiriluti í Føroyum helst framvegis er sinnaður fyri eini skipan, sum liggur millum fullveldisætlanina og verandi heimastýrisskipan.

Harafturat vísir henda kanningin, eins og tann seinasta, at vinstrifloyurin fær undirtøku frá meiri enn helvtini av veljarunum. Men spurningurin er sjálvandi, um tjóðveldisflokkurin kann roknast upp í vinstraveingin ídag!

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Jenny Petersen á Bakkanum í Fuglafirði 80 ár 7. apríl

Ein tann síðsti kollfirðingurin, Jenny Petersen, vina mín, verður áttati ár 7. Apríl í ár. Hon ber skaldanavnið við sær, Kollfjarðarkonan, sum er so vakurt at ikki eitt dism av hóttandi kvasirytmum úr Fuglafirði hava nartlað av uppruna hennara. Hon hvílir í sær sjálvum, samtíðis sum Jenny er úr Kollafirði , er hon í sinn og skinn ein Bakkakona.

Hon hevur búð her norðuri meira enn eina hálva øld. Mong av teimum, sum vit vóru góð við, liggja nú undir grønu torvu. Mannin – Hjalmar, misti tú, har lívið kundi givið tykkum væl av árum í blíðum kærleiksvindi saman, men so var ikki. Men Jenny steðgaði ikki upp, hon fór undir dagin væl hjálpt av børnunum og í mínum eygum, er hon eins og ein guðinna av Bakkanum.

Enn síggja vit teg fara eftir Ovara vegi við føstum fetum við einum kollfjarðarsmíli. Andin av degnum røkkur eisini til okkum, sum hava traðkað okkara barnaskógvar á Bakkanum, og siga skal eg tær, vina mín, at mær hóvar so sera væl títt "kollfirð-ianska" lyndi , smíl og orðafar. Fáur dugur sum tú, at síggja tað lætta í tí dagliga og bara við einum trimum orðum, at fáa smílið at lýsa fyri degi, so lagið verður betri. Tá ið svá er, ja, so verður alt ljósari og lættari. Hetta er ein dygd.

Mong ein løta er farin eftir vegnum í góðum práti av Posthúsinum, frá Haraldsen og Keypssamtøkuni." Hetta eru bara orð", kundi onkur sagt, "sum lítlan og ongan týdning hava"; men soleiðis er tað ikki. Hetta er rót føroysk mentan at fara kant av kanti og skifta orð sína millum um bygdalív og heimsins viðurskifti. Hetta er heimsspeki, tí bygdakvinnan og bygdamaðurin eru heimsborgarar (kosmopolittar)

Hóast gingið verður við einari innkeypstasku, tá ið onnur ganga við einari strongdari, svartari skjáttu við nýmótans hvølpalási á, so er meiri skaldskapur í tínari keypskjáttu. Ja, tað er munur á, og hann er heldur ikki so lítil.

Ikki veit eg, nær tú sært best út, um tað er við keypsskjáttini, ella tá ið bingoskjáttan er á lofti, ella tá ið tú sum heimsborgari fert til Týsklands at vitja dótturina. Ikki dugi eg, at taka dagar millum hesi viðurskifti, men eitt veit eg, tú hevur búð á Bakkanum í Fuglafirði næstan alla mína tíð. Tú ert millum teir síðstu, ektaðu kollfirðingarnar her á landi, hóast tíni ár í Fuglafirði. Tað svitast ikki.

Ja, Jenny, takk fyri gott prát í tí farna og hjartaliga til lukku við teimum áttati árunum og gott lívskvøld.

Heilsan Frits

Matiné í Christianskirkjuni

Í dag, leygardagin,kl 11.30 verður matiné í Christianskirkjuni.

Á skránni verða verk av Mozart, Bach og sangir av Waagstein, sum Pauli í Sandagerði hevur útsett fyri klaverkvartett. Eisini verður floytuduett við næmingum frá musikkskúlanum í Runavík.

Tað eru Morid Simonsen og Maria Tausen, sum spæla Grand Duo Concertant av P. A. Genin, Katja Volovelskaja spælir klaver saman við teimum.

Hini sum framføra eru Ljudmila Berezina, bratsch og violin, Alex Sólstein, violin, Jens Christian Guttesen, cello og Helga Hilmars Gerðalið, klaver og orgul.

Hjartafelagið

Á seinasta aðalfundi varð Sólvá Dam, sjúkrasystir, vald til formann í felagnum eftir at Ása Poulsen bar seg undan afturvali.

Nýggjur føroyskur dr.med.

34 ára gamli læknin Tórur Dalsgaard, sonur Virgar Dalsgaard og Hannu, f. Nolsøe, vardi mikudagin 28. mars sína dr. med.-ritgerð við Københavns Universitet. (Hvidovre Hospital). Evnið var um hormonala viðgerð av arteriosclerosu.

Tøkk

Eg takki øllum, sum gjørdu mær 90 ára føðingardagin so hugnaligan við at koma inn á gólvið, at ringja, at senda fjarrit og at senda blómur.

Simon David Kalsø
Klaksvík

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Fyrireika føroyingar til at basa oljudálking

Bjargingarfelagið í Suðuroyar norðaru helvt hevur nú keypt oljuverndarútgerð. Nú eru vit væl fyri at basa oljudálking, um eitt óhapp skuldi hent, sigur Pauli Einarsson, sum er ein av undangongumonnunum at fáa hesa útgerðina til landið

OLJUVERND
Áki Bertholdsen

Best er at binda um heilan fingur.

Tað heldur Bjargingarfelagið í norðaru helvt í Suðuroy.

Og nú oljuvinnan er við at taka seg upp í Føroyum, helt felagið eisini, at tað var neyðugt at hava útgerð til at avmarka umhvørvisligu avleiðingarnar av eini oljudálking, skuldi eitt óhapp hent.

Tí hevur felagið nú keypt eina rúgvu av útgerð, sum verður brúkt at basa oljudálking við.

Útgerðin er keypt úr Noregi og hon kom higar til lands við vaktarskipinum, Brimli, seinasta leygardag. Sumt er eisini komið við Gorm.

Pauli Einarsson á Tvøroyri, sum er ein av undangongumonnunum at fáa útgerðina til vega, sigur, at tey hava verið so heppin at hava gott samstarv við feløg í Noregi og so tey fingu útgerðina fyri ein ógvuliga sámuligan kostnað.

Í løtuni liggur útgerðin á goymslu í húsunum, sum Føroya Shell eigur innanfyri Drelnes og sum felagið var so vælviljað at lata bjargingarfelagnum til endamálið.

Væl fyri

Pauli Einarsson sigur, at nú felagið hevur fingið hesa útgerðina, eru føroyingar rættiliga væl fyri at verja umhvørvið, skuldi eitt óhapp hent onkustaðni, sum ber í sær, at olja lekur á sjógv.

Útgerðin fevnir m.a. um ein skimmara, ella ein oljuupptakari, sum tað eisini kann nevnast. Síðani verður pumpa sett til, sum so pumpar oljuna upp í tangar, td. á Brimli, ella í ein annan tanga.

– Men vit hava eisini ein tanga í Suðuroynni. Fyribils hava vit ein tanga, sum tekur 50.000 litrar og tað er ein góð byrjan.

– Skimmarin og pumpan verður drivin av motori og kunnu sostatt virka óheft av aðrari orku.

Felagið hevur eisini fingið 550 metrar av sterkum oljusperringum, sum tola aldu uppá 1,5-2 metrar og eitt hál uppá 11 tons, so tað skal standa nógv á, áðrenn tær ikki makta uppgávuna. Sperringarnar eru 40 sentimetrar, umframt ein kant upp á 10 sentimetrar omanfyri vatnskorpuna, umframt eitt skjúrt uppá ein metur undir vatnskorpuni.

Pauli Einarsson sigur, at er dálkingin av einum slíkum slagi, at tað ikki ber til at brúka sperringarnar, hevur felagið eisini fingið eitt slag av kustum, sum eru long, loðin bond, sum draga oljuna við sær og síðani fra ígjognum eitt, sum mest av øllum minnir um eina velduga strúkirullu, ið kroystir oljuna burturúr, so at hon aftur kann verða pumpað í tangar.

– Vit hava eisini fingið 175 metrar av lættari sperringum til minni dálking.

Pauli Einarsson sigur, at hesar sperringarnar kunnu ikki bara brúkast til at taka upp eftir oljudálking. Tær kunnu eisini brúkast til at verja strendur, ella eitt nú alibrúk, við, um olja skuldi enda á sjónum.

Umframt hetta, hevur felagið eisini fingið aðra útgerð, eitt nú pumpur o.s.fr. Tær kunnu m.a. brúkast til at hjálpa einum báti, sum er farin at leka olju. Pauli Einarsson leggur afturat, at slangurnar til pumpurnar passa til úttakini á dekkinum á Brimli.

Pauli Einarsson vísir tó á, at útgerðin, sum nú er komin, kann bara metast at vera byrjanin.

– Enn manglar rættiliga nógv í. Eitt nú tørvar okkum lættari útgerð at brúka til smá óhapp, eitt nú um eitt skip bunkrar yvir.

Men tað væntar hann verður ein partur af landsuppgávuni, tí hann væntar, at løtt útgerð kemur at liggja ymsastaðni í Føroyum.

– Men vit hava heldur ikki útgerð til at reinsa strendur við og vit hava og okkum manglar eisini útgerð at vaska hesa útgerðina við, tá ið hon er brúkt.

Liggur sera væl

Pauli Einarsson sigur, at útgerð sum hendan, liggur sera væl fyri í Suðuroynni.

– Tað eru tvær havnir á tvørafjørði. Og skuldi tað hent, at veðrið ger, at tað ikki slepst at á aðrari keiini, slepst altíð at á hinari keiini, og tað haldi eg, er ein stórur fyrimunur, sigur hann.

Hann vísir eisini á, at tað er í samsvari við løgtingsins vilja, at útgerðin er í Suðuroynni, tí løgtingsins vilji er at oljuverndarútgerðin skal vera í Suðuroy.

– Nú eru vit væl fyri at basa eini oljudálking, sigur Pauli Einarsson. Hann stendur her frammanfyri útgerðini, sum Bjargingarfelagið í Suðuroyar norðaru helvt nú hevur hevur fingið til at at basa oljudálking við. Fremst á myndini er skimmari, og aftanfyri standa pumpur, motorar, sperringar og onnur útgerð